# TILTØK

**Hebron, Argir**
Mikukvøldið hittast vit í húsbólkum. Fáið nærri at vita á tlf. 315226.

**Samkoman Rhema**
*Staravegur 5*
Fríggjakvøldið kl. 20 JC TEENS.
Sunnudagin kl. 15 verður jólaveitsla fyri børn. Øll eru vælkomin. www.rhema.fo

**Missiónshúsið við Landavegin**
Hóskvøldið kl. 20 Møti.

**Meinigheitshúsið**
Týsdagin kl. 20 Bíbliutími, Áps 27,27 - 28,10.
Mikudagin kl. 19 venur Meinigheitskórið.
Hóskvøldið kl. 20 Ungdómsmøti, Jólaevangeliið v/ Klæmint Tausen.
Leygarkvøldið kl. 16.30 Bønarløta fyri kvinnur.
Sunnudagin kl. 15 Jólafest fyri børn undir skúlaaldur. Kl. 18 Jólafest fyri børn í skúlaaldri.

**Ebenezer**
Týsdagin kl. 17 Frítíðararbeiði.
Mikudagin kl. 17.30 AWANA, kl. 20 Bønar- og uppbyggingarmøti.
Hósdagin kl. 20 Ungdómsmøti.
www.ebenezer.fo

**KFUM og KFUK í Havn**
Týsdagin kl. 17 í KFUK: Várgleði fyri børn.

**Samkoman Immanuel**
Mikukvøldið kl. 20 Møti.

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11.00: Morgunmøti og kl. 18.00: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

**Aglow, Norðstreymoy**
Jólamøti verður í Glæmuni í Kvívík fríggjakvøldið kl. 20. Allar kvinnur og menn eru hjartaliga vælkomin.

**Berøa, Saltangará**
Møti við Pól Færø verður í kvøld kl. 19.30. Evnið verður andalig sjálvrøkt. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Gøta**
Týskvøldið kl. 20 Glyvra-Hanusarshús, bibeltime v/ Peter O. K. Olofson: Advent.

**Kongshavnar Kvinnufelag**
Jólahugni verður mikukvøldið 3. des. kl. 19 fyri limir við gesti.

**Siloa, Fuglafirði**
Bøn, bíbliulæra og hugnalig samvera verður í Siloa mikukvøldið kl. 19.30, Páll á Lakjuni talar. Evnið: Orðið varð hold (Jóhs. 1. kap.). Øll eru hjartaliga vælkomin.

**KFUM & K í Klaksvík**
Mikukvøldið 3. des. kl. 20 Bíbliutími. Evnið: Johannes kap. 3-4 v/ Ólavur Johannessen.
Hóskvøldið kl. 20.30 Gospelkórið »Gleði venur«.
Fríggjakvøldið kl. 21 Opið hús.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bønarmøti, kl. 18 Møti við Leivur í Búð, kl. 21 Ungdómsmøti.
Evnið: Gentu og dreingjahornið. Øll eru vælkomin.
www.kuff.fo

**Soli Deo Gloria**
Hóskvøldið kl. 20 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarmøti.

**Aglow, Klaksvík**
Møti verður á Soli Deo Gloria, fríggjakvøldið 5. des. kl. 20. Øll eru vælkomin.

**Missiónshúsið í Skopun**
Mikukvøldið kl. 20 Bíbliutími.
Hóskvøldið kl. 20 hevur Sjómanskvinnuringurin jólahugna. Havið jólapakka við. Allar kvinnur eru hjartaliga vælkomnar.

**Betel, Vágur**
Ónsdagin kl. 20 Uppbyggingarfundur v/Lív & John í Skemmuni.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Í kvøld kl. 20 Heimaforbundið.
Onskvøldið kl. 19 Juniorsoldátmøti.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
*Mánadagin 1. desember*
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 10-18 Gera dekoratiónir
kl. 14-18 Kortspæl, telving, landastrok, bobbspæl,dart og onnur spøl.
Tilmelding til døgurðan miku- og fríggjadagin, tlf. 316491
*Týsdagin 2. desember*
kl. 10-12.00 Vit baka til jóla
kl. 10-11.30 Jólasangløta, Jóhan R. Jacobsen. Øll eru hjartaliga vælkomin
kl. 14.30 Jórun Fregnast. Jórun Simonsen um hennara lívssøgu. Aftaná verður prátað um at hava opið mikukvøld komandi ár
*Mikudagin 3. desember*
kl. 10-13 Matgerð, Anne Grethe Harlou
kl. 12 Døgurði. Til ber at koma sum gestir
kl. 15 Túrur, vitja Smiðjuna í Lítluvík
*Hósdagin 4. desember*
kl. 10-10.30 Jólafimleikur, Sonja Danielsen
kl. 14-17.00 Telduprát, Brandur Petersen
*Fríggjadagin 5. desember*
kl. 10-13.00 Matgerð, Anne Grethe Harlou
kl. 12.00 Døgurði. Til ber at koma sum gestir
kl. 13-17 Opið hús

*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Fløvi – dagtilhaldið fyri pensiónistar**
*í kvinnufelagshúsinum á Glyvrum*
*Mánadagin 1. desember*
Fimleikur v/ Jóhannu Troest. Drekkamuður
*Týsdagin 2. desember*
Drekkamuður. Ítrív fyri áhugað
*Mikudagin 3. desember*
Drekkamuður. Jórun Hansen spælir violin
*Hósdagin 4. desember*
Drekkamuður. Afturhvarv í práti og sangi
*Fríggjadagin 5. desember*
Opið hús. Kaffi, te og pannukøkur

*Eins og vanligt er, verður byrjað við einum Guðs orði, og framvegis eru luttakararnir vælkomnir at taka eitt og hvørt ítriv við sær, eitt nú stokkar o.a. Bløðini eru til taks í Fløvanum. Serflutningstænastan v/ Andreas Poulsen er byrjað. Hava tygum tørv á koyring, ringið vinarligast tlf. 448051.*

**Tilhaldið Hugnin í Sandoynni**
Tilhaldið í Sandoynni er opið mánadag og mikudag frá kl. 14-17. Báðar dagarnar er drekkamuður at fáa.
*Mánadagin 1. desember*
Sólrun Christiansen lesur 16. part úr søguni »Sin egen lykkes smed«.
*Mikudagin 3. desember*
verður farið til Skálavíkar til hugnakvøld. Farið verður úr Tilhaldinum við bussi kl. 17.30. Kostnaður 100 kr.

**Dagtilhaldið í Vági**
er hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15 til 18. Øll eru vælkomin.

**Spælistovan í meinigheitshúsinum**
er opin mána-, miku- og hósdag kl. 9-12 fyri foreldur við børnum, sum ikki hava ansing.

**Føroya Heimavirkisfelag**
Postadressa: J. Paturssonargøta 24, 100 Tórshavn.
Formaður: Óluva Vilhelmsen.
T-postur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Tlf. 322686 / 319629

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 319630.
Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórsh. tlf. 319630/61 655400.

**ACA**
(Adult children anonymous). Fundur fyri tilkomin, ið eru uppvaksin í alkoholiskum ella dysfunktionellum familjum er hvørt leygarkvøld kl. 20.00-21.30 á Tinghúsvegi 37, Tórshavn. www.aca-danmark.dk.
E-mail: acafaroeislands@hotmail.com

**NA (Anomymir narkomanar)**
Tinghúsvegur 37
NA-Fundur hvørt sunnukvøld kl. 20.00 til 21.00 á Tinghúsvegnum 37.

**AA-fundir í Havn**
**Tinghúsvegur 37**
Mánadag: kl. 20.00–21.00
Týsdag: kl. 20.00–21.15
Mikudag: Sporafundur kl. 20.00–21.00
Hósdag: kl. 20.00–21.00
Fríggjadag: kl. 20.00–21.00 og kl. 22.30–23.30
Leygardag: kl. 9.00-10.00 opin fundur. Kl. 17.00–18.00
Sunnudag: kl. 11.00–12.00.
Allir fundir eru roykfríir.
Heimasíða: http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

**Al-Anon**
Fundur fyri avvarðandi at alkoholikarum er hvørt týskvøld og hóskvøld kl. 20 í Al-Anon, Tinghúsvegur 37. Telefontíð er fríggja-, leygar-, sunnu- og mánadag frá kl. 19-21 á tlf. 508030.

**AA-fundur í Eysturoy**
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan. Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

**AA-fundir í Vágum**
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld og leygarkvøld kl. 19.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

**Al-Anon í Vágum**
Fundur fyri avvarðandi hjá alkoholikarum er hvørt týskvøld kl. 19.30 í Gamla skúla í Sandavági.

**AA-Suðuroy**
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 19 og sunnudag kl. 15.
Hvønn sunnudag síðst í mánaðinum – opin fundur kl. 15.

**AA í Vági**
AA fundir verða í Undirhúsinum onsdag og leygardag kl. 19.00.

**Blái Krossur – Glyvrar**
bjóðar til eftirviðgerðarfund hvørt mánakvøld kl. 19 í hølunum hjá Bláa Krossi á Glyvrum.

**Blái Krossur – Eiði**
bjóðar til eftirviðgerð í Losjuni á Eiði annaðhvørt týskvøld kl. 20. Meira fæst at vita á tlf. 315575.

**Náttarravnarnir í Tórshavn**
Tín stuðul ger mun! Blív limur ella gang ein royndartúr. Ringið Carl 215570, Guðrið 220019, Hans Jákup 217818, Tone 261165, Ella 316261, Arni 222552

**Lymfødemfelagið**
Box 2113, FO 165 Argir
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð. Samband fæst við felagið á tlf. 448454, Fía í Túni, ella tlf. 313424, Arnhild Johannesen.

**Føroyskir fiskimenn uttanlands**
tlf. 21 04 95.
Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svøríki, Danmark, Íslandi og Noregi. Limagjald 200 kr. um árið. Postgiro 57894. Fø. Sparikassi 442027-8.

**Heilafelagið**
*felagið fyri apopleksi- og afasirakt*
Íslandsvegur 10
tlf. 321520
T-post: heila@post.olivant.fo

**Felagið fyri lesi- og skriviveik**
*Postadr.: MBF-Húsið Íslandsvegur 10c*
Endamál felagsins er at hjálpa teimum ið hava lesi- og skrivitrupulleikar.
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð men samband fæst við felagið á tlf. 441541, Anne Karin Kjeld og 318867, Laila Egholm.

**Parkinsonfelagið**
*MBF-húsið, Íslandsvegur 10C*
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið hjá Kristinu, tlf. 317317.

**Kvinnuhúsið**
svarar alt samdøgrið á tlf. 317200. Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

**Giktafelag Føroya**
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
T-post: gikt@post.olivant.fo
Skrivstovan: Tlf. 31 02 37
Opið: týs- og hósdag kl. 13.00-16.00.
**Fibromyalgibólkurin:** Opið mánadag kl. 11.00-13.00.
**Foreldraumboð:**
Nicolina Højgaard, heilsusystur tlf. 31 47 50.

**Deyvafelag Føroya**
*Íslandsvegur 10B*
Skrivstovan er opin mánadag til hósdag frá kl. 10.00 til kl. 15.00. Tlf. 317597, fartlf. 222381, skrivitlf. 316929 fax 313609 og teldupostadr. deaf_fo@post.olivant.fo heimasíðan: www.deaf.fo

**MBF – Meginfelag teirra brekaðu**
*Íslandsvegur 10c*
*FO-100 Tórshavn*
Skrivstovan er opin allar gerandisdagar millum kl. 09.00 og 16.00.
Tlf. 317373, fartlf. 264839 faks. 310813
Teldupostur: mbf@mbf.fo
Heimasíðan: www.mbf.fo

**Alzheimerfelagið**
Tórsbyrgi 16 · 100 Tórshavn
Heimasíða: www.alzheimer.fo
t-postur: sigmo@post.olivant.fo
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið á tlf. 313102.
Demenslinjan er telefonráðgeving í øllum viðvíkjandi demens. Tlf. 313102 svarar týsdag kl. 18–20.

**Sinnisbati**
Íslandsvegur 10 C, 100 Tórsh.
tlf. 322544 · Fax 310813
T-postur: sinnbati@post.olivant.fo
Skrivstovan er opin mikudag frá kl. 16.00-18.00. Fyrsta mikudag í mánaðinum er opið til kl. 19.30.
Tú ert vælkomin at ringja og spyrja um alt, sum hevur við sinnistrupulleikar at gera á tlf. 322544.

**Føroya Felag Móti Krabbameini**
*Grønlandsvegur 58, Tórshavn*
Telefontíð mánadag til fríggjadag frá kl. 13-15.
Tlf. 317959.
Teldupost: ffk@post.olivant.fo
www.ffk.fo

**Cøliakifelag Føroya**
Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10C.
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst við at ringja til onkran av nevndarlimunum: Annegreta tlf. 448664
Beinta tlf. 310574
Henning tlf. 314783.

**Epileptikarafelag Føroya**
Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10 C. Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst á tlf. 313978, Randfríð Sørensen, ella tlf. 319793, Mari Johannesen.

**Nýrafelagið**
Postsmoga 1063
110 Tórshavn.
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið á e-mail: thomsen1@post.olivant.fo
Tlf. 315928, Odny
Tlf. 315786, Karin Elisa
Tlf. 314796, Hallbjørg

**Føroya Astma/Allergifelag**
MBF-húsið, Íslandsvegur 10c, Tlf./fax 311419.
Upplatingartíðirnar eru: hvønn hósdag kl. 16.30-18.

**LISA -**
*Skrivstovan hjá Listafólkasambandið Føroya í Pætursarstovu*
Tlf: 320197
Teldupostur: lisa@lisa.fo
Heimasíða www.lisa.fo
Opið: mánad. - fríggjad. kl. 9-12, tó týsd. kl. 16.30 - 20.30.

**Amnesty International, Føroya deild**
Tinghúsvegur 18, 4. hædd
Tlf. 315816
Skrivstovan er opin mánadag frá kl. 13.00-17.00 og mikudag frá kl. 9.30-17.30.
Heimasíðan: www.amnesty.fo
Teldupost: Amnesty-Amnesty.fo

## V4-dráttur
**í drátti nr. 1515**
**29. nov. 2003**

**Tølini:** 42 - 39 - 10 - 80 - 87 - 1 - 64 - 54 - 97 - 21 - 77 - 58 - 57 - 14 - 68 - 17

**Tveir vinnarar**
Snars. nr. 2725575, Hvalba
Snars. nr. 2711086, Argir

**Eykavinningur**
Snars. nr. 2717338, Tórshavn

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum

## GULLBRÚDLEYP

Í dag, týsdagin, hava hjúnini Jenny og Venzel Olsen, Rituvík gullbrúdleyp. Tey, ið vilja heilsa uppá gullbrúðarparið eru vælkomin á Runavíkar Sjómansheim kl. 18.

Týsdagin 16. desember hava Dania og Kaj í Bartalsstovu, Syðrugøta, verið gift í 50 ár. Dagurin verður hildin í Bygdarhúsinum í Leirvík sunnudagin 14. desember kl. 15.00. Tey, ið vilja gleða gullbrúðarparið við at koma verða biðin um at siga frá á tlf. 441025 ella 228939 áðrenn 6. desember.



# UTTAN ÚR HEIMI

# Blóðugt vikuskifti í Irak



*Amerikanskir hermenn við líkinum av øðrum av teimum báðum japonsku diplomatunum, sum vórðu skotnir í Irak um vikuskiftið*

**Mannfallið í Irak hevur ongantíð verið so stórt síðani kríggið sum í síðsta mánað. Teir sameindu mistu 109 menn, teirra millum 79 amerikanskar hermenn**

IRAK
*Árni Joensen.*
*fartekst@mail.dk*

Hetta vikuskiftið var sera blóðugt í Irak. Fyrst doyðu sjey spaniumenn í einum álopi. Síðani varð ein kolombiskur vinnulívsmaður skotin norðan fyri Bagdad, og nakrar tímar seinni doyðu tveir japanskir diplomatar, tá irakar lupu á teir við býin Tikrit. Har doyðu eisini tveir suðurkoreanskir elektrikarar, og nærhendis sýriska markinum vórðu tveir amerikanskir hermenn skotnir, tá ókendir menn lupu á teir.

Sunnukvøldið svaraðu amerikanararnir aftur. Talsmenn hjá herleiðsluni søgdu, at irakar høvdu gjørt fleiri álop við býin Samarra norðan fyri Bagdad, og at amerikanski herurin hevði rikið álopið aftur. Amerikanararnir nýttu bæði kanónir og stríðsvognar í bardaganum, og tá avtornaði, høvdu 54 irakar latið lív, og tólv vóru tiknir fangar. 18 irakar og fimm amerikanskir hermenn vórðu særdir.

Sambært amerikonsku herleiðsluni vóru irakararnir í búnum hjá Fedayeen-herdeildini, sum verður roknað sum trúgvur stuðul hjá fyrrverandi forsetanum Saddam Hussein. Keldur á irakskum sjúkrahúsum søgdu, at minst átta sivilir irakar doyðu í amerikanska mótálopinum.

Við álopunum um vikuskiftið mistu USA og tess sameindu 109 menn í november. Av teimum vóru 79 amerikanskir hermenn. Tað er hinvegin ikki greitt, hvussu nógvir irakar lótu lív.

# Fylgisveinur kemur aftur um 50.000 ár

**Ein fylgisveinur skal mala í ringrás um Jørðina og lenda aftur um 50.000 ár. Hann verður eitt slag av einum fløskuposti.**

RÚMDIN
*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*

Tað er franski listarmaðurin og vísindamaðurin Jean-Marc Philippe, sum hevur fingið hugskotið um at lata ein fylgisvein mala runt um Jørðina tey næstu 50.000 árini, og at hann so skal lenda aftur á Jørðini.

Ætlanin er, at fylgisveinurin skal virka sum ein fløskupostur.

- Øll fólk fáa høvi at senda eini talgild boð, sum eftirtíðin síðani kann lesa, sigur Jean-Marc Philippe. Einasta avmarkingin er, at boðini mugu ikki vera meiri enn 6.000 tekn.

Hugskotið, sum eftir øllum at døma verður veruleiki í 2006, er ein stór tøknifrøðilig avbjóðing til vísindina. Franskir granskarar hava ment ein serligan skjøldur, sum skal vera fylgisveinin tey nógvu árini, og sum skal verja hann, tá hann skal seta seg aftur.

Talgildu boðini verða sett á serligar glasplátur, og ein vegleiðing verður løgd við, so fólk um 50.000 ár kunnu síggja, hvussu tey skulu fáa fatur á boðunum.

## TIPS 13 úrslit
**Vika 48 – 29. nov.**

| | | |
|---|---|---|
| 1. | Aston Villa–Southampton | 1 |
| 2. | Blackburn–Tottenham | 1 |
| 3. | Bolton–Everton | 1 |
| 4. | Charlton–Leeds | 2 |
| 5. | Portsmouth–Leicester | 2 |
| 6. | Cardiff–Ipswich | 2 |
| 7. | Crystal Palace–Coventry | X |
| 8. | Norwich–Crewe | 1 |
| 9. | Nottingh. F,–West Bromw. | 2 |
| 10. | Reading–Watford | 1 |
| 11. | Sheffield U.–Preston | 1 |
| 12. | Sunderland–Burnley | X |
| 13. | West Ham–Wigan | 1 |

**Prognosa:**

| | |
|---|---|
| 13 røtt: | 75.377,- kr. |
| 12 røtt: | 1.723,- kr. |
| 11 røtt: | 126,- kr. |
| 10 røtt: | 28,- kr. |

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum

## TIPS 12 úrslit
**Vika 48 – 30. nov.**

| | | |
|---|---|---|
| 1. | AB–FC Midtjylland | X |
| 2. | AGF–Herfølge | 2 |
| 3. | Brøndby–FC Nordsjælland | 1 |
| 4. | OB–Frem | 1 |
| 5. | Viborg–FC København | 2 |
| 6. | Arsenal–Fulham | X |
| 7. | Chelsea–Manchester U. | 1 |
| 8. | Liverpool–Birmingham | 1 |
| 9. | Manchest. C.–Middlesbro. | 2 |
| 10. | Hansa Rostock–Dortmund | 1 |
| 11. | Hertha Berlin–Schalke 04 | 2 |
| 12. | Milan–Modena | 1 |

**Prognosa:**

| | |
|---|---|
| 12 røtt: | 65.618,- kr. |
| 11 røtt: | 2.393,- kr. |
| 10 røtt: | 249,- kr. |

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum

HAVNAR BIO
P Tlf. 311956 P
www.bio.fo




Týsdagin 02.12. kl. $19^{30}$ Týsdagin 02.12. kl. $22^{30}$
Mikudagin 03.12. kl. $19^{30}$ Mikudagin 03.12. kl. $22^{30}$
Hósdagin 04.12. kl. $19^{30}$ Hósdagin 04.12. kl. $22^{30}$




Týsdagin 02.12. kl. $19^{15}$ Mikudagin 03.12. kl. $19^{15}$
Hósdagin 04.12. kl. $19^{15}$




Týsdagin 02.12. kl. $22^{00}$ Mikudagin 03.12. kl. $22^{00}$
Hósdagin 04.12. kl. $22^{00}$




Billettprísur: 45,- kr.
Týsdagin 02.12. kl. $17^{15}$ Mikudagin 03.12. kl. $17^{15}$
Hósdagin 04.12. kl. $17^{15}$

KOMANDI FILMAR




Frumsýning Fríggjadagin 05.12.




Frumsýning
Mikudagin 17.12. kl. $18^{00}$ Mikudagin 17.12. kl. $22^{15}$
Forsølan er byrjað

Stórt úrval av DVD-filmum til sølu